Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Flyting av fiskidøgum til árið eftir verður víðkað til eisini at fevna um bólk 5)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. mai 2025, verður aftaná stk. 4 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fiskidagar, sum bólkur 5, sambært § 18, stk. 1, nr. 5, ikki hevur brúkt í fiskiárinum, tó í mesta lagi 10% av tillutaðu døgunum, kunnu flytast til árið eftir at brúka í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 31. desember, herundir treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2027.

Samtykt á Løgtingi hin 2. desember 2025 við 33-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 3. desember 2025

stjóri

LM-046/2025